# AB missir stuðulsleikarar

AB stríðist í hesum døgum fyri sætinum í bestu føroysku fótbóltsdeildini. Framvegis er nakað eftir á málið, og tí kemur tað dátt við, at liðskiparin Janus Joensen og Rói Danielsen ikki verða við í seinnu kappingarhálvu. Heimasíðan hjá argjamonnum skrivar, at báðir skulu til Danmarkar í útbúgvingarørindum.
Kenneth Jacobsen verður tí liðskipari hjá AB.



# Páll skal døma finaluna

Ólavsøkudag klokkan 16 verður fyrsta bríkslið í finaluni um løgmanssteypið 2009. Nú er tað nakað síðani, at tað varð greitt, at EB/Streymur og Víkingur skulu stríðast um løgmanssteypið.
Í dag boðar Fótbóltssambandið frá, at tað verður Páll Augustinussen, sum verður 23. maðurin á vøllinum. Hjálpardómarar verða Regin Egholm og Johnleif Gerðisá. Fjórði dómari verður Dagfinn Olsen.

# Møguleikin er serstakliga lítil

**EB/Streymur skal í kvøld spæla seinna undankappingardystin í Champions League. Møguleikin fyri víðari luttøku er sera lítið, og tí er tað fyrst og fremst fyri føroyskum fótbólti, at sundalagsmenn skulu stríðast fyri**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

- Tað er ikki tað, sum liggur fremst í huganum, men vit fara niður á Kýpros fyri at vinna dystin.

Tað segði Magni Mohr, annar av venjarunum hjá EB/Streymi, eftir dystin móti Apoel Nicosia á Tórsvølli í farnu viku. Tí tað verður sanniliga trupult hjá sundalagsmonnum at vinna seg víðari í triðja undanumfar í Champions League í kvøld.

### Tá var klassamunur

Fótbólturin á Kýpros er væl framman fyri føroyskan landskappingarfótbólt. Tað varð dyggiliga staðfest í farnu viku, tá Apoel Nicosia vann 2-0 á EB/Streymi. Tað var klassamunur millum liðini, og tí er sera lítið sannlíkt, at sundalagsmenn fara at leypa hvøkk á kýpriotisku meistararnar.



Arnbjørn Hansen og liðfelagarnir úr EB/Streymi høvdu tað trupult móti Apoel Nicosia á Tórsvølli í farnu viku.

Savnsmynd

HB royndi seg hósdagin í farnu viku í nógva hitanum á Kýpros. Tá varð oddaliðið í føroysku landskappingini hølvað av, og tapti 4-0. Og uppgávan hjá EB/Streymi verður neyvan nógv lættari. Fyrrapartin í vóru hitastigini 36 í tali á Kýpros.

### Helst einki stig

Føroysk feløg hava tikið lut í altjóða kappingum síðan 1992. Úrtøkan hevur verið so sum so, men seinnu árini hevur tað í fleiri førum eydnaðst at vunnið Føroyum stig. Men tað verður helst ikki hesaferð.

B36 og NSÍ taptu sínar dystir. EB/Streymur og HB taptu í fyrstu royndini. Og við teimum dystunum í huga, bendir lítið á, at Føroyar vinnur stig í ár. Men nú fáa vit at síggja.

# Høgni Madsen aftur í KÍ

**Erland B. Danielsen er helst langtíðarskaddur. Tí gjørdi leiðslan í KÍ skjótt av og skrivaði í gjár sáttmála við Høgna Madsen**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Høgni Madsen, sum seinastu mánaðirnar hevur spælt við NSÍ, fer nú aftur at spæla við KÍ. Tað skrivaði heimasíðan hjá klaksvíkingum í gjár. Nógv bendir á, at hann skal loysa av miðvallaran Erland B. Danielsen, sum noyddist av vøllinum við drúgvum skaða í landskappingardystinum móti B68 sunnudagin. Liðbandini dragnaðu nógv hjá honum.
- Tað er í løtuni trupult at svara, nær eg spæli aftur. Men tað má tíðin vísa. Tað er eisini óvist við krossbandinum og meniskinum, sigur Erland B. Danielsen við heimasíðuna hjá Bláu Bylgju.

### Madsen aftur

Høgni Madsen spældi eisini í KÍ í tíðarskeiðnum frá 2005 og 2006. Tá táttaðist hann við Tony Paris, táverandi venjaran, undir dystin og fekk sekkin umgangandi. Síðan hevur hann spælt við barndómsfelagnum ÍF, og síðan í vetur hevur hann verið knýttur at hópinum hjá NSÍ.
Sáttmálin er galdandi fyri hetta kappinarárið.



## Stjørnan fær rumenskan landsliðsleikara

Vágaportalurin skrivar, at Durita Christoffersen ikki fer at spæla hondbólt í Klaksvík komandi kappingarár. Tískil er sáttmáli skrivaður við Valentina Suciu

Kristoffur Ragnarson, formaður í Stjørnuni, váttar fyri Vágaportalinum í dag, at Valentina Suciu skal spæla við felagnum í komandi kappingarári. Hon er 28 ára gomul, og hevur í alt spælt 10 landsdystir fyri Rumenia. Hon hevur á yrkisleiðini roynt seg sum hondbóltsleikara í Íslandi, Italia, Týskandi og Rumenia, har hon hevur spælt seinasta árið.
Suciu skal ætlandi loysa av Duritu Christoffersen, sum ikki fer at spæla hondbólt.

*-uni*